tíðindablaðið
sosialurin

56. árg. ★ kr. 5,-

Nr. 26 ★ hósdagur 3. mars 1983

frælsi javnaður brøðralag

Verða ósannindi brúkt ímóti Dylluprojektinum!

Tað er nakað, sum bendir á, at ósannindi verða brúkt ímóti tí ætlaða svartkjaftaprojektinum í Kollafirði, Dyllan. Hetta kom fram í Sosialinum 22. februar í ár, tá formaðurin í Búskaparráðnum, Sofus Olsen vísti aftur einum úttalilsi frá Agnar Nielsen, løgtingsmanni um, at Búskaparráðið hevði steðgað viðgerðini av Dylluni orsakað av, at ein av nevndarlimunum í Dylluni hevði sent eitt skriv til Egnsútviklingsgrunnin við tí endamáli at vísa sína ónøgd við ætlaða Dylluprojektið. Sofus Olsen vísti harafturímóti á, at Búskaparráðið av álvara arbeiddi við Dylluprojektinum.

Nú váttar stjórin í Egnsútviklingsgrunninum, Arnting, at teir einki skriv hava fingið úr Føroyum og at teir sostatt einki kopi hava sent til Búskaparráðið



Egnsútviklingsgrunnurin hevur ikki fingið nakað skriv sendandi frá einum av nevndarlimunum í ætlaða svartkjaftaprojektinum Dyllan í Kollafirði og hevur heldur ikki sent kopi av nøkrum tilíkum skrivi víðari til Búskaparráðið í Føroyum.

Hetta sigur stjórin í Egnsútviklingsgrunni- Arnting, í samrøðu við Tíðindablaðið Sosialin. Herfyri varð upplýst í tinginum av tingmanninum Agnari Nielsen úr Sambandsflokkinum.) sitat: »Búskaparráðið hevði steðgað viðgerðini av Dyllunu-málinum orsakað av einum skrivi, sum tað hevði fingið kopi av frá Egnsútviklingsgrunninum. Egnsútviklingsgrunnurin hevði fingið hetta skriv frá einum av nevndarlimunum í Dylluni.«

Uppá fyrispurning hvørja støðu Egnsútviklingurin hevur til figgjan av svartkjaftaframleiðslu í Føroyum sigur Arnting, at teir onga støðutakan hava, fyrr enn teir hava viðgjørt henda spurning væl og virðiliga og fyrr enn teir hava fingið úttalilsi frá landsstýrinum, Búskaparráðnum og ríkisumboðsmanninum.

— Fyribils hava vit nøkur úttalilsi frá løgmansrøðuni, tað, sum hevur staðið í bløðunum og líknandi. Vit kunnu ikki út frá hesum gera nakra meting.

Arnting sigur, at teir kunnu ikki taka støðu til Dylluprojektið fyrr enn teir hava fingið hesi úttalilsi frá føroysku myndugleikunum.

— *Hvat siga tygum til at útbyggja verandi flakavirki við svartkjaftalinjum?*

— Til tað kann eg bert siga, at vit vita, at tey føroysku flakavirkini í nógvum førum fáa ov lítið av rávøru. Men kann ein so útnytta framleiðsluorkuna betri við at taka svartkjaftin inn í myndina, so ljóðar tað skilagott. T.v.s. uttan at tað tó verður neyðugt við fleiri iløgum á hesum virkjum. Men um tað reint tekniskt kann lata seg gera, veit eg ikki.

Vit spurdu Hedegård, sum viðger føroysk mál í grunninum, um teir annars hava fingið svartkjaftaprojekt til viðgerðar. Hann vísir á Dylluprojektið men teir hava einki við tær útbyggingar, sum skulu gerast á verandi flakavirkjum. Hann heldur hetta kemst av, at her er talan um rættiliga lítlar iløgur.

Annars sigur Hedegård, at Egnsútviklingsgrunnurin bert figgjar projekt, sum bera seg, og tað metir hann ikki, at verandi framleiðsla av svartkjafti ger.

— Der opereres med så store kvantum blåvilling, at det færøske samfund vil forbløde, rent økonomisk hvis man skal fortsætte at støtte denne gren af fiskeriet og fiskeindustrien så meget som i dag.«

Egnsútviklingsgrunnurin hevur annars bert havt eitt føroyskt svartkjaftaprojekt til viðgerðar fyrr. Tað var í 1979. Tá segði grunnurin nei til eitt virki í Gøtu, tí her var heidur ikki rentabilitetur í.

jan

Svaldbardrækjurnar enn einaferð!

Norðmenn geva 10 nýggj rækjuloyvi

— hóast teir hava sagt seg hava viljað avmarkað rækjuveiðuna í samsvar við játtan føroyinga at skerja sína veiðu við Svalbard

Hallstein Rasmussen, fiskaristjóri í Sosialinum 5. februar 1983: — **Vit geva ikki fleiri loyvi at fiska rækjur við Svalbard.**

Úr norska blaðnum »Nordland Framtid«:

Konfliktene lurer rundt Svalbards fiskerisone

At det ligger massevis av politisk konfliktstoff i og omkring fiskevernsonen rundt Svalbard, kom med all tydelighet frem i Tromsø i går, der Instituttt for Fiskeriføg ved Universitetet i Tromsø hadde sitt fjerde seminar, denne gangen med tema «Fiskerivernsonen ved Svalbard». Som statssekretær Leiv Grønnevet blant annet uttrykte det, så er dette området et av de siste hvor man har en teoretisk lekkasje i systemet med det nye havrettsregimet og 200 n. mila økonomiske soner. Siden fiskevernsonen ble opprettet for ca. fem år siden, har Norge måttet hanskes med en rekke problemer, forårsaket av andre land, og her har Spania markert seg starkast negativt.

I TROMSØ
TORILL MUNTER

Norge har fått enorme reguleringsbyrder i dette området, sa statssekretæren, som behødet at dette ville fortsette i minst en tiårsperiode framover. Grønnevet sitte for øvrig spørsmål ved hvorvidt Spania kunne holde sitt fiske i fiskevernsonen uten at de i virkeligheten drev med statsstøtte.

Han mente imidlertid at innen man har fått bygget opp igjen torskebestanden, ville den havgående fiken fra Storbritannia og Vest-Tyskland ikke lenger være å finne i Svalbardsonen. Problemet er Spania, som utgjør en trussel også i framtiden, fordi de har bygget opp en stor moderne havgående fiske.

Statssekretær Leif Grønnevet.

FÆRØYENE REDD FOR Å MISTE RETTIGHETER

Kontorsjef i den færøyske administrasjon, **Arni Olafsson**, understreker landets totale avhengighet av å fiske i fjerne farvann, og på denne bakgrunn trakk han fram en rekke tall som viste at Færøyene de senere år har fått mindre og mindre andel i andre lands soner.

Spesielt var han bekymret for det norske vrakfisket ved Svalbard.

Norsk ekspansjon her kan føre til at Færøyene får en mindre og mindre andel, påpekte han. Fra kystens og 4 nautiske mil gjelder fiskevernsonen og Færøyene er derfor ikke forpliktet av bestemmelsene fra kysten og ut til fire nautiske mil, påpekte han. Dette vonet er offisielt bekreftet i Oslo, men færøyske fiskere har likevel ikke benyttet seg av retten til å fiske i disse farvann.

Denne opplysningen klargjorde for konferansen at man faktisk står overfor en «gliptp» i loven, et hull som faktisk alle traktatmakter kan benytte seg av, dog under Norges traktatfestede suverenitet.

Olafsson stilte spørsmålstegn ved hvorvidt det er Norges hensikt på lengre sikt å fjerne alle fremmede land fra vernesonen rundt Svalbard. — Da vil Norge ha meget få vonner tilbake, sa han.

Ingen tvil om norsk suverenitet på Svalbard

— Det er ingen som helst tvil om at Norge har de samme suverene rettigheter i en sone av 200 nautiske mil rundt Svalbard som vi har på land. Svalbardtraktaten utelukker ikke økonomisk sone rundt Svalbard, men Svalbardtraktaten dreiete ikke om at slike soner skulle bli aktuelle da den ble undertegnet i 20-årene. Artikkel 1 slår fast Norges høyhetsrett over Svalbard, og det er artikkel 11 som setter visse betingelser for denne suvereniteten, sa professor Fletcher.

Norges rett til å regulere innenfor fiskevernsonen er hevet over tvil, men professor Fletcher trakk fram en rekke komplisserende forhold, ikke minst i lys av Svalbardtraktatens ordlyd, som ikke tilsier at man de nærmeste år kan se noen løsning på problemene. Mange land «vaker» i vannskorpa, her dreier det seg ikke bare om fisk, men om strategiske interesser og ikke minst forventninger til oljeressurser i området. Dette gjør at stormaktene som Sovjet og USA formelt ikke aksepterer fiskevernsonen, selv om de begge i praksis respekterer den, imidlertid med visse særfordeler for Sovjet som nekter rapporteringsplikten.

Professor Fletcher

Professor Fletcher hevdet at det fikk var gjøanlig traktaten for å hevde at bevaringstiltak skulle være felles tiltak mellom signatarmaktene. Men er også Norge suveren, mente han.

Prinsippet står striden mellom Norge og de øvrige traktatland om hvorvidt Svalbardtraktaten skal gjelde for fiskevernsonen i tillegg til selve øygruppen, eller hvorvidt den bare skal ha anvendelse for øygruppen. Professor Fletcher (og Norges offisielle holdning) er at traktaten ikke gjelder for fiskevernsonen, med unntak av territorialfarvannet på fire nautiske mil rundt øyene.

Sokkelen var ikke oppfunnet da traktaten ble utarbeidet, og Svalbard er ikke noen egen stat, men en del av Norge.

Professor Fletcher framhevet at der bevir det ikke er gjort unntak i traktaten, gjelder prinsippet uavkortet om Norges suverenitet. Dette synet er aksepteret av alle land unntatt Sovjet og Øst-Europa som har protestert, eller ikke satt spørsmålstegn ved videre, som han sa.

Stormaktspillet ligger klart i kortene, og det er ikke usannsynlig at Sovjet senere kan komme til å etterg. sin protest mot å få X antall tonn i «trukking, tranøkere. Flere schet som en tesis.

Håndbok for innvandrere

En ny informasjonshåndbok for innvandrere i Norge blir distribuert i disse dager. «Innvandrere i Norge» vil bli oversatt til 10 forskjellige innvandrerspråk, og inneholder viktige opplysninger om rettigheter og plikter for innvandrere, samt informasjon av praktisk art. Meningen er at dette skal være et hjelpemiddel for innvandrere til å orientere seg i det norske samfunnet. En redaksjonskomite med både nordmenn og innvandrere står bak boka. Kommunal- og arbeidsdepartementet har finansiert den, mens Universitetsforlaget gir den ut.

(NTB).

Meðan føroysk rækjuskip hava rokfiskiskap við Svalbard verður nógv tosað um rættindini til fiskiveiðu við Svalbard. Og menn eru langt frá á einum máli um, at norðmenn eiga einsamallir rættindini til fiskiveiðu innanfyri 200 fjórðingar kring Svalbard.

Sosialurin hevur í seinastuni skrivað um hesar spurningar og kom blaðið eftir, at hóast føroyingar hava gjørt avtalu við norðmenn um at skerja talið á skipum til fimm stundis í rækjuveiðuni við Svalbard, so hevur kortini óavmarkað tal av skipum loyvi at fiska innanfyri 4 fjórðingar. Hetta vistu føroyskir rækjumenn ikki.

Fyri góðari viku síðan var eitt fiskivinnuseminar hildið í Tromsø undir heitinum »Fiskevernssonen ved Svalbard.« Her luttók m.a. Arni Olafsson, skrivstovustjóri í landsstýrinum.

Sosialurin hevur fingið hendur á norska blaðnum »Nordlands Framtid« frá 25. februar, har nógv verður skrivað um Svalbard og eisini Føroyar.

Her kemur m.a. fram av tí, sum Árni Olafsson førdi fram, og sum hann m.a. hevur úr greinum í Sosialinum (sí greinina í miðjuni) at luttakararnir á skeiðinum ikki vóru greiðir yvir at Føroyar og onnur traktatlond hava loyvi at fiska óavmarkað innanfyri 4 fjórðingar við Svalbard.

Annars meta norðmenn, at teir eiga rættin til fiskaríkidømið við Svalbard. (Meira um henda spurning í leygardagsblaðnum).

Hóast norðmenn yvirfyri føroyingum í samband við nýggju fiskiveiðuavtaluna millum bæði londini hava sagt, at teir vilja avmarka sína veiðu, so er okkurt sum bendir á, at hetta er ikki so.

Sambært blaðið Fiskaren frá 15. februar hevur »Fiskeridepartementet« givið 10 nýggj loyvi til norskar rækjutrolarar í 1983.

Hetta samsvarar illa við tað norski fiskaristjórin, Hallstein Rasmussen segði við Sosialin 5. februar í ár. Tá segði hann m.a.: »Tað er eingin, sum avmarkar seg so nógv sum vit. Vit hava eina konsessiónslóg í samband við rækjuveiðu. Vit geva ikki fleiri loyvi at fiska rækjur við Svalbard.

Og nú verða so 10 loyvi givin. Ein kann spyrja um grundarlagið undan teirri avtalu, sum er gjørd millum Føroyar og Noreg er burturdottið. Og enn er henda avtala ikki samtykt í løgtinginum.

Um orsøkina til at 10 nýggj loyvi verða givin stendur, at bátarnir hava ilt við at bera seg orsakað av reguleringunum í toskaveiðuni.

jan